# Her mangt annað enn bert kirkjubøstólar



*Í mong ár hevur langi skuggin av kirkjubøstólunum hingið yvir so mongum øðrum forngripi, og Arne Thorsteinsson nýtir fegin høvið at flyta ljósið á aðrar týðandi fornlutir eina løtu. Her stendur hann við einum bronsuluti úr miðøld*

*Mynd: Jens K. Vang*

**Á Fornminnissavninum í Brekkutúni í Hoyvík leggja tey í hesum døgum seinastu hond á framsýningina, ið skal vísa fram forngripirnar, sum heimkomnir eru úr Danmark. At ljósið enn sum áður nærum bert verður varpað á kirkjubøstólarnar, halda savnsfólkini vera ikki sørt spell, tí so mangir aðrir lutir av stórum týdningi eru at finna í rúgvuni av fornlutum, sum nú verða settir fram til sýningar**

FORNGRIPIR

*Dagfinn Olsen*

At trína innar í Brekkutúni 6 í Hoyvík, er sum at trína innar í annan og fornan heim. Og tað er í veruleikanum eisini tað, sum tað snýr seg um, tí her heldur Føroya Fornminnissavn til og framsýningar av fornlutum.

Handan enn stongdar dyr gongur tað mest spennandi á hesum stað fyri seg í løtuni. Leygardagin klokkan 14 lata dyrnar upp fyri almenninginum, og tá skal framsýningin av fornlutum, ið heimkomnir eru av danska tjóðsavninum, vera klár at vísa fram.

Og hetta er ein sýning, ið sýnir fram mangt, ið er av alstórum týdningi søguliga og ikki minst granskingarliga.

## Lív í millum fornlutirnar

Almenningurin og miðlar hava mest havt á lofti gitnu kirkjubøstólarnar. Men har er eisini annað. Og vit settu okkum fyri at seta fram spurningin, um vit ikki kundu koma framvið og frætta um okkurt annað, enn stólarnar, sum hava fylt nógv í almennum kjaki í mong ár og sum hava fingið ljós varpað á seg, so skuggin er langur og hongur yvir mongum øðrum lutum, sum eisini væl tola ljós og umtalu.

Og tað var, sum kom lív í fólkini, ið stillisliga og varisliga hjúkla um gomlu fornlutirnar í heimkomnu sýningini.

- Tað er fyri neyðini og eitt gott hugskot, at okkurt annað eisini verður drigið fram í ljósið, at vit flyta fokus eitt sindur, eru fyrstu orðini hjá Arna Thorsteinsson, fornfrøðingi og fyrrverandi landsantikvari.

- Ikki tí, kirkjubøstólarnir eru fínir og hava stóran týdning. Alt gott um teir. Men her er eisini so mangt annað, so tað er gott, at ljós eisini verður varpað á aðrar fornlutir.

Men hví hava stólarnir úr Kirkjubø fingið so stóran leiklut, at teir hava hug at kasta skugga yvir aðrar lutir, ið eisini hava stóran týdning, men eru púra ókendir?

- Jú, kirkjubøstólarnir eru fínir og hava týdning. Men hetta hevur helst nakað at gera við, hvat tosað og skrivað verður um. Hvat miðlafólk og onnur velja at gera burturúr. Og stólarnir hava verið frammi í miðlum og politiskum og almennum kjaki í 100 ár ella meira, metur Arne Thorsteinsson, ið fegnast um møguleikan at sleppa at siga frá um aðrar lutir í forvitnisliga savninum av heimkomnum fornlutum.

## Søguligir persónar

Framsýningin av lutunum, sum heimkomnir eru úr Danmark, letur upp leygardagin. Talan er um eina presentatiónsframsýning, ið stendur uppi eina tíð, áðrenn lutirnir verða settir saman við tí, ið annars er á Forminnissavninum frammanundan.

Vit fara innum stongdu dyrnar og Arne greiðir frá, meðan savnsvørðar, savnstøkningar og elektrikarar starvast millum liðug og hálvliðug glasbúr og aldargamlar lutir.

- Sýningin er bygd upp, so sum lutirnir nú einaferð eru innkomnir á savnið í Danmark. Fyrsta rúmið er tað, ið hoyrir til Oldnordisk Museum, tað er innkomið frá umelið 1817. Næsta rúm er tað, sum er úr Kirkjubø og 3. rúm er tað, ið hoyrur til Dansk Folkemuseum, har tað fyrsta úr Føroyum kom inn í 1888 og tað síðsta í 1966, sigur Arne Thorsteinsson.

- Í 1817 byrjaði samband millum Føroyar og danska savnið. Lyngbye prestur greiddi frá um doypifuntar. Seinni kom so ein ferðamaður, ið varð sagdur at hava eitt kanska ivasamt greivaheiti. Hann tók doypifuntarnar og ein steinkross úr Kirkjubømúrinum við sær til Danmarkar. Í 1830 er tað Pløyen kemur í myndina. Hann gjørdist Landfúti í Føroyum og var tá bert 26 ára gamal. Hann savnaði fyri danska savnið og hevur helst verið í samband við savnið áðrenn hann kom og hevur heilt greitt fingið boð um at hava eyguni eftir stakkastási. Vit hava eitt fínt sett úr Kalsoynni, ið vísir greitt samband so mangar vegir út í heim, og sum eisni sigur eitt sindur um fíggjarstøðuna, greiðir Arne frá, meðan vit hugtiknir eygleiða eitt krúthorn úr glasi hjá Schrøder.

Ein stór kista stendur fyrst ein kemur innar. Hana hevði tann fyrsti av Mohrættini við sær til Føroya, hann nevndist Nicolai Frederik Mohr og kom hann í 1700 talinum.

- Jú her eru fleiri søguligir persónar umboðaðir, sigur Arni.

Vit ganga víðari fram og koma framvið stásiligum krúthorni hjá gitna Harra Klæmint á Sandi. Og framvið einasta rúnarkelvi, ið vit vita um. Einum sigursteini og einum gandaringi úr Sørvági, ið kann steðga næsablóði. Ringurin er frá 1621 og er gjørdur til endamálið, tí ritað er í hann og hetta kann bert gerast, áðrenn ringurin verður latin aftur.

## Myntskatturin av Sandi

Eitt serstakt trygdarsýningarskáp úr glasi stendur enn tómt, men har koma myntir at liggja. Talan er um virðismikla myntskattin, ið funnin var á Sandi.

- Hetta er nakað heilt serligt og hevur alstóran týdning. Ikki minst innan gransking, sigur Arne og greiður frá um teir menn, ið myntskatturin vísur aftur til. Magnus Berføtta, ið var sonur Ólav Kyrra, sum aftur var sonur Harald Harðráða, hálvbróður Ólav Heilaga. Harald var seinni kongur og leyp í 1066 á Ongland. Eisini var hetta tíðin og teir menn, ið fyrstir gjørdu, at hugtakið inflatión kom í, tí teir blandaðu ov nógv uppí silvuri.

- Fyrsta rúm er sum heilt frá fyrstu tíðum og so frameftir. Hetta hevur stóran søguligan týdning, sigur Arne Thorsteinsson, sum sjálvur hevur verið í Danmark og fingið til vega tað, ið komið er til Føroya.

Enn eru lutir í Danmark, sum Fornminnissavnið eigur, men hesir verða nýttir í sýningum. Savnið av føroyskum lutum er býtt sundur innan rímuligt mark millum søvnini. Har eru lutir, ið ikki eru rímuligir at krevja aftur, ella vit hava teir frammanundan, og lutir, ið ynskiligt er koma seinni, t.d. eitt pottmál, ið løgtingið hevði og sum helst hevur verið nýtt til eftirkanningar.

## Sjórænarar

Miðrúmið, rúm 2, er serstakt. Her stendur tað, sum hevur verið í Kirkjubø. Kirkjubøstólarnir og okkurt annað. Ein serligur hugni er í rúminum, ið er skýmligt og ljósið fær ein ávísan hita av litinum í gamla trænum, sum er sýnt fram kring í rúminum. Sum at ganga eftir kirkjugólvinum við stólunum við lið, hóast nakað langt er ímillum.

Í rúmi nummar 3 er tað, ið var á Dansk Folkemuseum. Áhugaverd er ein krukka til salvu úr Nólsoy, ið er sera kend, tí hon er tengd at frásøgn um sjórænarar. Hildið var, at krukkan var burtur, men hon kom undan kavi aftur á danska savninum og tað fegnast savnsfólkini um.

Eisini stakkanálir úr gyltum silvuri eru at síggja og Arni greiðir frá, at hesar hava verið á heimsframsýningini í París ár 1900 og eru so helst strandaðar aftur á danska savninum.

Síðani eru sera nógv amboð, ið kanska ikki tykjast merkisverd í fyrsti syftu, men sum hava alstóran týdning og eru sera áhugaverd. Tað er læknin á Eiði, R.K. Rasmussen, ið sendi sera nógv av hesum til danska savnið at varðveita.

Millum annað er ein forvitnisligur leypur við loki og lási. Hesar nýttu prestar vanliga og lyftur ein lokinum, so sæst, at í lokinum er serstakt rúm til kragan.

Síðsti innkomni luturin er ein borðbátur, ið ber av øllum, so vakur og væl úr hondum greiddur er hann. Og allur reiðskapur er við eisini.

Ferðin í fornari føroyskari søgu er at enda og vit nærkast hurðini, tá eg beri við ristaran, sum Arne í Svf ikki segði seg finna útav, tí hann tyktist ónýtiligur.

- Men enn hevur eingin sagt seg vita nærri at greiða frá hesum, hóast mong eru komin við skilagóðum uppskotum, sigur Arne, sum við stórum innliti og frásøgugleði hevur nýtt henda kærkomna møguleika at varpa ljós á sýningina og kanska eisini geva øðrum lutum, enn bert gitnu kirkjubøstólunum, eitt pláss í ljósinum eina løtu.

Leygardagin lata dyrnar inn í forna heimin upp fyri almenninginum, men longu í dag er samkoma fyri innbodnum, har Ulla Tørnæs, kenslumálaráðharri handar Annlis Bjarkhamar og Mentamálaráðnum fornlutirnar.